




*Hósvíkingurin*
## Andras Nybo
*er arbeiðsformaður í Sunda kommunu*

**Hvat er tykkara uppgáva uppundir Sundalagsstevnuna um vikuskiftið?**
- Vit seta flaggstengurnar upp í stevnubygdini Hvalvík og hanga perur á keiøkinum. Annars hava vit asfalterað og gjørt dráttin kláran til kappróðrarbátarnar og mangt annað. Alt er sjeinað upp so frægt sum vit kunnu, sjálvt kirkjugarðurin.

**Hvat gera tit á sjálvari stevnuni?**
- Vit hava onga fasta kommunala uppgávu, uttan tað at ein maður passar fløggini. Annars eru vit til reiðar, um okkurt óvæntað hendir, t.d. um streymur manglar á økinum.

**Hvat gert tú sjálvur á stevnuni?**
- Fríggjakvøldið verður eitt serstakt "112-tiltak", og tá skal eg luttaka saman við øðrum sløkkiliðsmonnum. Annars gleði eg meg til kappróðurin. Næsta ár verður stevnan í Hósvík, og tá fái eg í øllum førum nóg mikið at gera, tí tá er øll bygdin við í fyrireikingunum.



**NÁTTARFRIÐUR**

*Í brævi frá Tórshavnar Kommunu hevur Jóhan í Kollafirði fingið at vita, at hann skal hava hanarnar innandura um náttina*

Mynd : Alvur Haraldsen

# KOYR HANARNAR Í SONG

Eirik ur Lindenskov

**HANAGÓL** Nakað soleiðis kunnu boðini skiljast, sum Jóhan í Kollafirði hevur fingið frá Tórshavnar kommunu. Jóhan býr gamla kolonihavanum á Ternuryggi í Havn, og á ognini hevur hann fýra hanar. Í skrivi frá Tórshavnar Kommunu hevur hann fingið at vita, at kommunan hevur fingið eina klagu um hesar fýra hanar, sum gala á ognini.

- Umborð fyri Tórshavnar Kommunu hevur verið á eftirlitið 21. apríl í sambandi við klaguna. Har vóru fýra hanar uttan fyri húsini, men teir vóru sera friðarligir. Har stóðst eingin larmur av teimum, sigur kommunan í brævi til Johan.

Kommunan vísir so til reglugerð fyri flogfenaðhald og djórahald, sum sigur, at hanar ikki mugu vera uttandura frá klokkan 21 á kvøldi til klokkan 08 á morgni.

- Tórshavnar Kommuna vil tí heita á tygum um at vísa skynsemi í sambandi við tygara hald av flogfenað og hava hanarnar innandura um náttina, eru boðini frá kommununi til Johan í Kollafirði.

*eirikur@sosialurin.fo*

## Í MORGIN




Fyrrapartin lot til andøvsgul av útsynningi, turt og sólglottar, men út á seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk og regn av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.

## LEYGARDAGIN




Hann minkar vindin niður í andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 16 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu** nátt:
Eitt hátrýst, 1024 hPa. sunnan fyri Ísland kemur spakuliga hendavegin.




**Komandi** nátt:
Hátrýstið við Føroyar fer í landsynning og viknar. Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar hóskvøldið.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 61 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

**Hitalagið kring knøttin**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 3. juni | Mánin longst frá jørðini |
| 4. juni | Seinna kvarter |
| 12. juni | Tendring |
| 15. juni | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. juni | 04:38 | 16:59 | 03:38 | 15:59 | 03:53 | 16:14 | 06:38 | 18:59 | 07:38 | 19:59 | 02:53 | 15:14 | 01:53 | 14:14 | 04:53 | 17:14 | 05:53 | 18:14 | 04:23 | 16:44 | 05:38 | 17:59 |
| 10. juni | 05:22 | 17:46 | 04:22 | 16:46 | 04:37 | 17:01 | 07:22 | 19:46 | 08:22 | 20:46 | 03:37 | 16:01 | 02:37 | 15:01 | 05:37 | 18:01 | 06:37 | 19:01 | 05:07 | 17:31 | 06:22 | 18:46 |
| 11. juni | 06:12 | 18:39 | 05:12 | 17:39 | 05:27 | 17:54 | 08:12 | 20:39 | 09:12 | 21:39 | 04:27 | 16:54 | 03:27 | 15:54 | 06:27 | 18:54 | 07:27 | 19:54 | 05:57 | 18:24 | 07:12 | 19:39 |
| 12. juni | 07:07 | 19:35 | 06:07 | 18:35 | 06:22 | 18:50 | 09:07 | 21:35 | 10:07 | 22:35 | 05:22 | 17:50 | 04:22 | 16:50 | 07:22 | 19:50 | 08:22 | 20:50 | 06:52 | 19:20 | 08:07 | 20:35 |
| 13. juni | 08:02 | 20:30 | 07:02 | 19:30 | 07:17 | 19:45 | 10:02 | 22:30 | 11:02 | 23:30 | 06:17 | 18:45 | 05:17 | 17:45 | 08:17 | 20:45 | 09:17 | 21:45 | 07:47 | 20:15 | 09:02 | 21:30 |